# TILTØK

**»Tíð til Gud«**
»Café kvøld« verður úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21.00. Verið hjartaliga vælkomin.

**Adventkirkjan**
Í kvøld kl. 19.30 Bønarmøti hjá Leu Jacobsen, Søldarfirði.
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: »Far framvið…« Kl. 11.00 Gudstænasta, Thorbjrøn Brochs.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsinstænasta í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Orðsinstænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni.
Leygardagin 10. nov. kl. 14.00-19.30 verður tiltakið »List og Bøn« hildið í Mariukirkjuni.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Hóskvøldið kl. 20.00 Bíbliutími v/ Høgna Poulsen, Fil. 1,1-30.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Frants Jensen.
Sunnukvøldið kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti v/ teimum ungu.
Mikumorgunin kl. 7 Bønarløta.

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Leigh og Jan Hjaltalin, Vípuvegur 9, kj., Tórshavn.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti og sunnudagsskúli, Fríðtór Debes talar. Øll eru vælkomin.

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin kl. 14.00 í Hoyvíkar skúla Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18.00 Møti við luttøku av Hjørleif Hammer. Øll eru vælkomin.

**Hebron, Argir**
Øll møti og sunnudagsskúli komandi sunnudag avlýst vegna samfelagsstevnu í Ebenezer.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Meinigheitskórinum.
Mánakvøldið kl. 20.00 venur Manskórið.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Fríggjadagin kl. 10.00 Uppbyggingarmøti. Kl. 15.00 Uppbyggingarmøti.
Møti í Ítróttarhøllini á Hálsi: Fríggjakvøldið kl. 20.00 Evangeliskt møti. Kl. 22.00 Opið hús.
Leygardagin kl. 16.00 Uppbyggingarmøti. Kl. 20.00 Evangeliskt møti. Kl. 22.00 Opið hús.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í kvøld kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen. Kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Kvøldmøti v/ Símun Absalonsen.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20.00 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin kl. 20.00 í KFUM: Opið hús fyri ung.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Tlf. andaktin 424741.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við luttøku úr Tjørnuvík, tala, sangur og vitnisburður. Øll eru hjartaliga vælkomin. Vegna missiónsviku í Vík komandi viku, verður onki møti í Hvalvík sunnudagin 18.11. møguliga verður skipað fyri farti norður til Víkar.

**Filadelfia, Sundalagi**
Sunnudagin kl. 18.30-21.15 Alpra-skeið í Unitum í Kollafirði.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman, við hugna, vitnisburði og sangi. Vitjan úr Suðuroy.
Leygarkvøldið kl. 19.00 møti við Jens Vestergaard o.fl. Opið hús kl. 21.00 við Eyðun Jacobsen.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Jan Jacobsen. Møti kl. 17.00 við Jens Vestergaard o.fl. Barnamøti kl. 17.00.

**Norðskála**
Kirkju- og missiónsvikan heldur fram í kvøld við møti kl. 20.00. Talari: Kjartan Stakksund, Eiði.

**Missiónsvika á Hellunum**
Hósdagin kl. 20.00 talar Knút Larsen, menn av Strondum syngja.
Fríggjadagin kl. 20.00 talar Torleif Johannesen, Petur Hans og Thomas syngja og spæla.
Leygardagin kl. 20.00 talar Regin Høgnesen, Hannis syngur og kl. 22.30 Ungdómsløta.
Sunnudagin kl. 18.00 talar Niels Jacob Nielsen, Leila Højgaard syngur, innsavnan til Heimamissiónina. Øll eru vælkomin.

**Lívsins Orð**
Barnamøti verður í dag kl. 17.15.
Sunnudagin kl. 10.30 verður møti við Símun Jacobsen.
Mánadagin kl. 17.00 møta Liljurnar og ungdómsbólkurin kl. 20.30.

**Soli Deo Gloria**
Mikumorgunin kl. 6.00 Bøn.
Hóskvøldið kl. 20.00 Bøn fyri ungdómsmøtunum.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Alpha skeið (13-18 ár)
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Ásu Lütsen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður í Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið, Skálavík**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 talar Mourits Mouritsen, Tórshavn, Magni Christiansen o.fl. syngja og spæla.
Leygarkvøldið kl. 20.00 talar Sverri Kass, Strendur, Magni Christiansen o.fl. syngja og spæla.
Sunnudagin gudstænasta við Høgna Poulsen, kl. 15.00 Sunnudagsskúli, kl. 19.00 Møti Torleirf Johannesen, sjómanstrúboðari talar, Manskórið í oynni syngur. Innsavnan verður til húsið leygarkvøldið og sunnukvøldið. Drekkamuður bæði kvøldini.

**Café One Way, Tvøroyri**
Fríggjakvøldið hugnaløta fyri børn 10 ár og eldri kl. 20.00-22.00.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Hugnaløta við »Gather« tónleiki (video).

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21.00 við Jónu Thomsen úr Nesvík.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Tom Danielsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið, Vágur**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14.00 sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Elisabeth og Sámal J. Joensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
**Kennir tú føroying í Keypmannahavn**, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
*Reyða Kross Føroya,*
*Bryggjubakki 10,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 311391/0045 22408269.*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 5. nov.:*
kl. 10.00-10.15: Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 10.15: Vit hugsa um jólini.
kl. 14.00-18.00: Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikudagin og fríggjadagin tlf. 316491
*Týsdagin 6. nov.:*
kl. 10.00–12.00: Vit baka til jóla
kl. 10.00–11.30: Sangur - Óli Vang. **Øll eru hjartaliga vælkomin.**
kl. 15.00: Vit gera oktober súltitoy til jóla
*Mikudagin 7. nov.:*
kl. 10.00–12.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15.00: Túrur
*Hósdagin 8. nov.:*
kl. 10.30–11.00: Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 14.00–17.00: Telduprát - Brandur Petersen
*Fríggjadagin 9. nov.:*
kl. 10.00–13.00: Matgerð – Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur.
kl. 13.00-17.00 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 11. nov. verður gingið av Gomlurætt til Argir. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Gingið verður í uml. 3 tímar. Havið heit og góð gonguklæðir og ein drekkamunn við. Tilmelding.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20.00-21.00 og 22.30-23.30.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Al-anon**
hevur fundir hvørt mánakvøld kl. 20.30 í gomlu læknahúsunum á Tvøroyri.

**Blái Krossur**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

## PRÓGV

Petur Weihe Dalsgaard, Tórshavn, hevur 31. oktober lokið prógv sum farmaceutur á Danmarks Farmaceutiske Højskole í Keypmannahavn.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
*tlf. 21 04 95.*
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF**
*Íslandsvegur 10C*
*100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 · Fax 310813*
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 10-14. Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
*Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
*Postsmoga 1063*
*110 Tórshavn.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroyingafelagið í Svøríki**
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570.
Leygardagin 1. des. kl. 15.00 verður føroysk jólaveitsla á Marholmen uttanfyri Norrtälje í Svøríki. Tit, ið hava hug at vera við ella hoyra nærri um tiltakið, vinarliga sigið frá í seinasta lagi 15. nov. hjá Annu, Tlf. +46 176-269536 ella Oddvør: tlf. +46 8895024.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Kristnastova**
*Birmavej 36, København S,*
tlf. 32551809 fax. 32586149
e-mail: kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis. Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.



# FILMSTEIGURIN

## Bandits

Tann sjarmerandi Joe (Bruce Willis) og hypokondriski felagi hansara Terry (Billy Bob Thornton) eru rýmdir úr fongslinum.

Á vegi teirra gjøgnum USA og undir eyknevninum »The Sleep over Bandits« rana teir ein banka fyri og aðrar eftir fyri at fíggja framtíðarætlan teirra um eitt helst ærligari lív sunnan fyri markið. Í slóð teirra leggja teir eftir sær ruðuleika, dularbúnar, knústar bilar og ein tilbiðjandi almenning júst inntil teir hitta Kate ( Cate Blanchett ), eina vónsvikna húsmóður sum teir tilvildarliga »renna seg í« á vegnum.

»Bandits« verður frumsýndur í Havnar Bio tann 9. november. Barry Levinson, ið er best kendur fyri »Rain Man« frá 1988, hevur leikstjórnað filmin.





## Captain Corellis Mandolin

Kríggj er, og tey eru fíggindar. Men tann sjarmerandi Corelli kapteynur er einki krígssinnaður. Hann vil heldur syngja opera við herfylki sínum enn at venja teir sum skotherdeildarmenn. Í eini harðari tíð finnur han gleðina í teimum lítlu løtunum, sum tilveran nú hevur at bjóða. So sjálvandi kann hann ikki lata vera við at geva sær far um vakurleikan hjá Pelagiu, hvørs hús hann er sloppin at búgva í, og hjávera hansara er ein tornur í eyganum á tí unga fiskimanninum Mandras, ið er trúlovaður við Pelagiu, men fer burtur fyra at koma upp í hjá partisanunum.

Hersetingin gerst gerandisdagur á oynni, har italiumenn uppføra seg sum vóru teir á feriu. Pelagia og Corelli mugu skjótt viðurkenna, at tey eru drigin hvør at øðrum.

Undir krígnum kemur Pelagia at vera eitt samband millum Corelli og Mandrass, sum kanska ikki longur alment eru fíggindar, men bert elska somu kvinnu…

## Atlantis: Det forsvundne rige

Milo Thatch er høvuðspersónurin í nýggja actionævintýrteknifilminum hjá Walt Disney. Hann droymir um at fullføra leitingina av tí horvna ríkinum Atlantis, sum abbi hansara var byrjaður uppá. Tá ein dagbók, ið hevði verið vekk leingi, kemur undan kavi, vísir tað seg, at hon hevur nógv nýggj spor at ganga eftir, og ein millióningur játtar at fíggja eina kanningarferð til kongaríkið undir havi.

Milo loysir gátuna um horvna ríkið og endar við at føra kaptein Royrke og manning hansara til undirsjóarkongaríkið Atlantis. Tað teir finna er beint ímóti allar væntanir, og útloysir hetta nógvar stórar hendingar.…






**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 09.11. | kl. $20^{30}$ | Fríggjadagin | 09.11. | kl. $23^{00}$ |
| Leygardagin | 10.11. | kl. $20^{30}$ | Leygardagin | 10.11. | kl. $23^{00}$ |
| Sunnudagin | 11.11. | kl. $20^{00}$ | Sunnudagin | 11.11. | kl. $22^{15}$ |




**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 09.11. | kl. $18^{00}$ | Fríggjadagin | 09.11. | kl. $23^{30}$ |
| Leygardagin | 10.11. | kl. $18^{00}$ | Leygardagin | 10.11. | kl. $23^{30}$ |
| Sunnudagin | 11.11. | kl. $17^{30}$ | Sunnudagin | 11.11. | kl. $23^{00}$ |

**HAVNAR BIO**
Tlf. 3119 56




**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 09.11. | kl. $16^{00}$ | Fríggjadagin | 09.11. | kl. $17^{30}$ |
| Leygardagin | 10.11. | kl. $16^{00}$ | Leygardagin | 10.11. | kl. $17^{30}$ |
| Sunnudagin | 11.11. | kl. $15^{30}$ | Sunnudagin | 11.11. | kl. $17^{00}$ |

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 09.11. | kl. $19^{30}$ | Leygardagin | 10.11. | kl. $19^{30}$ |
| Sunnudagin | 11.11. | kl. $19^{00}$ | | | |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 09.11. | kl. $21^{30}$ | Leygardagin | 10.11. | kl. $21^{30}$ |
| Sunnudagin | 11.11. | kl. $21^{00}$ | | | |

**KOMANDI FILMAR**




**Frumsýning**
Mikudagin **19.12.** kl. $19^{00}$
Mikudagin **19.12.** kl. $22^{15}$
**Billettprísur: 70.- kr.**
**Forsølan er byrjað**

**Harry Potter**

**Frumsýning**
Fríggjadagin **23.11.** kl. $19^{30}$
Fríggjadagin **23.11.** kl. $22^{30}$
**Billettprísur: 65.- kr.**
**Forsølan er byrjað**